## Van Basten vil venja Huntelaar

Hollendski landsliðsvenjarin í fótbólti, Marco van Basten, skal eftir summarsteðgin hava leiðslun av hollendska felagnum Ajax. Hann vónar, at stóri álopsprofilurin í Ajax, Klaas-Jan Huntelaar verður verðandi í felagnum, hóast boð eru eftir honum frá europeiskum stórfeløgum. - van Basten hevur sagt mær, at hann vil skapa eitt sterkt lið, sum kann kappast í øllum kappingum, og hann hevur brúk fyri mær, sigur Huntelaar.



## Valencia hevur besta stadion

Enska sjónvarpsstøðin Setanta hevur gjørt ein lista við teimum fótbóltsvøllunum kring Europa, har besti stemningurin er. Ovast á listanum er heimavøllurin hjá spanska felagnum Valenica. Í hølunum á Valencia koma Liverpool, Marseille, Galatasaray, Portsmouth, Dortmund, Celtic, Roma, Olympiakos og Feyenoord. Og á 11. plássi kemur svenska felagið Hammarby, sum KÍ spældi Europa Cup dyst ímóti í fjør.

EB/Streymur-B36 3-2 (2-1):

# Gera klárt til greipuna

**Tað kann væl vera, at B36 eigur steypið, sum tó komandi árið verður lænt til Sundalagið. Men við einum sannførandi finalusigri hevur EB/Streymur sett fulla ferð móti greipuni hetta kappingarárið**



*Fótbóltur snýr seg um liðavrik. Men einstaklingar skulu eisini til, og sum ikki einaferð, so var tað Arnbjørn T. Hansen, ið fekk mótstøðufólkini at tagna*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á pappírinum var EB/Streymur heimaliðið í finaluni um løgmanssteypið. Og tó at Gundadalur aloftast er borgin hjá havnarfeløgunum, so bendu umstøðurnar kring finaluna á, at EB/Streymur eisini hevði betra stuðulin.

At kalla alt vestara skýlið í Gundadali var blátt og svart, tá finaludysturin byrjaði, og hóast hvítu tikararnir í B36-skýlinum royndu at rópa við, so var blá/svarta aldan nakað væl meira mergjað á degnum.

Og tað gekk nú heldur ikki so long tíð, fyrr enn sundalagsfólkini, sum eisini hildu stevnu, veruliga fingu orsøk at koma í stevnuhýr.

## FAKTA um dystin

**EB/Streymur-B36 32 (2-1)**
**1-0:** Arnbjørn T. Hansen 10.
**2-0:** Hans Pauli Samuelsen, 19.
**2-1:** Karoly Potemkin, 38.
**3-1:** Arnbjørn T. Hansen, 76.
**3-2:** Karoly Potemkin, 79.
**Dómari:** Petur Reinert
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Levi Hanssen, Egil á Bø, Marni Djurhuus, Leif Niclasen – Bárður Olsen, Brian Olsen (Fróði Clementsen, 84.) – Hanus Eliasen (Marcel Balok, 87.), Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen – Arnbjørn T. Hansen
**Gult kort:** Sorin Anghel, Brian Olsen, Hans Pauli Samuelsen
**B36:** Meinhardt Joensen – Ásbjørn V. Gunnarsson (Róaldur Jacobsen, 80.), Herbert í Lon Jacobsen, Dmitri Jankovic, Alex José dos Santos – Magnus Olsen, Klæmint Matras, Tamas Nagy – Bergur Midjord, Karoly Potemkin, Johan Ellingsgaard
**Gult kort:** Alex José dos Santos

### Dýr mistøk

Talan hevði annars verið um hampuliga friðarliga uppgerð, og vandin tóktist sum so heldur ikki stórur. Men tá Bárður Olsen breyt B36-kontra og sendi langt niðan á vøllin, kundi Meinhardt Joensen ikki gera av, um hann skuldi sparka burtur ella ikki, og slík ivamál eru dýr, tá Arnbjørn T. Hansen er á mótstøðuliðnum.

Talan var um veruliga vatnpøs oman yvir B36, og frá hesi løtu var tað eisini EB/Streymur, sum sat á tí mesta. Undantakið var, tá B36 seinasta korterið undan steðginum trýsti nógv, men tað skuldi ikki verða dagurin hjá árstalsfelagnum.

Og sum so vóru hini bæði málini hjá EB/Streymi eisini ein undirstrikan av hesum. Bárður Olsen sendi millimetur neyvt fríspark í holið millum verju og málmann, tá Hans Pauli økti til 2-0, men B36-venjarin hevði tó alla orsøk at ilskast um, at ein maður kundi standa somikið leysur í hesi støðuni.

Og tá Dmitri Jankovic klossaði í nærdysti við Arnbjørn, so hesin kundi økja til 3-1, punkteraði dysturin fullkumuliga.

### Betra liðið vann

Og so kann leggjast afturat, at hóast málini komu eftir mistøk, so var tað altso fult uppiborið, at steypið annað árið á rað kom til EB/Streym. Millum tey trý málini hevði EB/Streymur avgjørt eisini aðrar møguleikar, og ta einu ferðina fantom-bjargaði Meinhardt stútara frá Hanusi Eliasen.

Einastu løtuna, at veruligur spenningur var í, var beint undan steðginum. Karoly Potemkin minkaði um munin eftir hornaspark, har EB/Streyma-verjan ikki veruliga var til reiðar, tá linjuverjin hevði broyt málspark til horna.

Og í løtunum eftir hetta var trýstið móti René Tórgarð og verju hansara sera stórt. Men nærri enn næstan kom B36 tó ikki. Heldur ikki hóast EB/Streymur bakkaði alt ov langt seinastu løtuna av dystinum, eftir Potemkin gjørdi sær dælt av sløsustum verjuspæli.

### Ávegis greipuni

Nú er ein steypafinala í sjálvum sær ein einstakur dystur, sum einki hevur við

